

# Barnslig byrjan

## Ársins summarfestivalur legði út við einum barnatiltaki á lítla Føroya tele pallinum

Óli Jákup Jacobsen

Veðrið var gott, og fitt av fólki var savnað til barnatiltakið, sum fekk heiðurin at byrja summarfestivalin 2010. Fimm flottar og dugnaligar gentir byrjaðu við eini dansiframførslu, áðrenn ein klóvnur kom á pallin. Saman við klóvninum sungu børnini onkran vælkendan barnasang.

Fólk legðist so stútt aftrat, og skjótt var lítla økið uttan fyri Føroya tele kjokkfult av børnum og vaksnum. Eftir klóvnin kom gyklarin Ásbjørn á pallin, og framførdi hann nøkur stuttlig gykl.

Børnini vóru heilt bergtikin av Ásbirni. Mitt í tí heila tók Ásbjørn og gyklaði Meylu fram, sum fór at framføra hittið hjá sær "Slikksjúk".

Í ein heilan tíma sungu, flentu og róptu børnini saman við Ásbirni, Meylu og øllum hinum. Ein góð barnslig byrjan.



# Skinu sum bjørt jólaljós

## Kultbólkurin Tinganest fekk sjón fyri søgn um at teir røkka vítt bæði tónleikaliga og aldursmessiga.

Sissal Kampmann

Bæði ung og gomul, kvinnur og menn stóðu klos upp at pallinum og sungu við, tá Tinganest fýrdu øll síni kendu løg av í Flags Tjaldinum fríggjakvøldið. Konsertin hjá Tinganest var lýst at byrja kl. 24.00, men bleiv framskunda til kl. 20.00. Av hesi orsøk vóru mong, sum ikki fingu høvi til at hoyra fólkakæru tónleikararnar úr Vágunum. - Antin tí tey ikki vistu, at konsertin var flutt, ella tí tey høvdu aðrar ætlanir hetta tíðspunktið. Tað er heldur ongin ivi um, at konsertin hjá Tinganest hevði verið nógv betur eydna, um hon var á miðnátt. Tónleikurin hjá teimum er tónleikur, ið hóskar seg best seint á kvøldi, tá fólk eru komin í veitsluhýri, klár at syngja við.

### Hittmaskinan úr Vágunum

Hóast konsertin var tíðliga á kvøldi, fóru Vágamenninir ikki galið í býin, tí tá teir diskaðu upp við øllum hittunum sum "Vágagellan", "Upp á tá", "Annan sang" og "Síðsta dans", vísti tað seg, at hetta vóru sangir, øll kendu og øll sungu við. Stemningurin var góður, og teir tríggjir á pallinum, Jóan Jakku Guttesen, Magnus av Stongum og Finnur Joen Jacobsen vóru ótrúliga væl samanspældir og høvdu gott samband við fjøldina, hóast guitaristurin Holgar Jacobsen ikki var við, vegna fráfall, tá teir á sín avslappaða, men yvirskotsagtiga hátti spældu og undirhildu okkum, ið vóru so heppin, at hoyra teir spæla. Men kann man annan enn elska tónleik og tónleikarar, ið skriva kærleikssangir, har niðurlagið er soljóðandi: "Tú var mín dreymur, bjørt sum eitt jólaljós"?



# Størsta talent í Klaksvík síðstu 10 árini

## So avgjørdur var frásøgumaðurin, Ólavur Presley, tá hann presenteraði 15 ára gamla Rógva Jacobsen í Flags tjaldinum.

Óli Jákup Jacobsen

Og tað var einki at taka feil av. Rógvi hevði eina ótrúliga hugtakandi og góða framførslu. Einsamallur við guitara megnaði Rógvi við síni sterku og hásu rødd at fylla tjaldið.

"Hatta var fantastiskt. Fólkini vóru við upp á tað, og ja – tað var bara fantastikst. Eg var ræðuliga nervøsur, men tá eg var byrjaður, koyrdi tað bara," sigur Rógvi í stuttari viðmerking eftir sína framførslu.

Fitt av fólki hevði leitað sær inn í teltið at lurta eftir Rógva, men tað merktist, at festivalurin ikki veruliga er komin á glið enn. Vónandi – og væntandi - spælir unga stjørnuskotið úr Klaksvík ikki 'bara' sum upphitari næsta ár.

# Bara smáir skaðar

Randi Jacobsen

Skaðastovan á Klaksvíkar Sjúkrahúsi hevði nógvar vitjanir undir Summarfestivalinum. Sjúkrabilarnir koyrdu stútt millum festivaløkið og sjúkrahúsið. Men eingin álvarsligur skaði hendi.

Fyri mesta vóru tað fólk, sum høvdu skorið seg ella vóru dottin, og nøkur beinbrot vóru.

Jákup Petersen, yvirlækni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi sigur, at eingin skaði var so mikið álvarsligur, at neyðugt var at senda sjúklingin á Landssjúkrahusið ella víðari.

Ein sjúklingur varð sendur til skanningar á Landssjúkrahúsinum, men viðkomandi bagdi einki álvarsligt.

- Nakrar styttri innleggingar vóru, og bara ein við beinbroti liggur enn, tí hann skal undir skurð í morgin, sigur Jákup Petersen.